## Endurskoða skipan

Eitt av málunum, sum landsstýrissamgongan setti sær fyri frá fyrsta degi av, var at endurskoða barsilsskipanina, og nú skal tað gerast. Sum er hava mammur rætt til lønt farloyvi í 24 vikur aftan á barnsburð og páparnir tvær vikur. Teir kunnu tó taka tær seinastu tíggju vikurnar av farloyvinum hjá mammuni. Bjarni Djurholm, landsstýrismaður, sigur við Útvarpið, at foreldrur eiga at hava rætt til lønt farloyvi í upp til eitt ár.

## Misjavnt fiskarí

Trolararnir, sum royna eftir svartkjafti, hava havt heldur misjavnt fiskarí í seinastuni. Finnur Fríði landaði smá 2.300 tons sunnunáttina, og teir fingu 350 tons í tí fyrsta hálinum, tá teir komu aftur á fiskileið á Munkagrunninum. Men hjá onkrum vóru bara um 50 tons í. Atlantic Navigator byrjaði hendan túrin vestur úr Mykinesi, men har var einki at fáa, skrivar Norðlýsið. Atlantic Navigator hevði í gjár 100 tons av surimi inni.

Tórshavnar Býráð á kunningarferð:

# Nólsoyingar á borgara

**Fleiri enn hálvthundrað nólsoyingar vóru møttir upp á borgarafundi, sum Tórshavnar Kommuna skipaði fyri í gjárkvøldið**

BORGARAFUNDUR
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*



*Væl av fólki hevði leitað sær í Royndarhúsið at hoyra, hvørjar ætlanir Tórshavnar Kommuna hevur fyri Nólsoy.*
*Mynd: Leo Poulsen*

Skráin var drúgv, tá Heðin Mortensen á odda fyri parti av umsitingini bjóðaði nólsoyingum til kunnandi fund í bygdarhúsinum í gjárkvøldið.

Býararkitekturin, havnameistarin, býarstjórin og leiðarin á sosialu deild vóru millum embætisfólkið, og teir greiddu frá hvør í sínum lagi um sítt serliga øki.

Ikki færi enn 13 punkt vóru á skránni, og tað tók tríggjar tímar at koma ígjøgnum tey øll. Har er so tað at siga, at fleiri »stórmál« vóru millum punktini, eitt nú nýggj Rita, sjúkraflutningur, tilhald og svimjihylurin.

Ein arbeiðsbólkur hevur fingist við málið um nýggja ferju til Nólsoyar, og greiddi Jákup av Skarði frá tí, ið higartil er hent í málinum. Á fundinum vóru fleiri ynskir sett fram í sambandi við nýggja Ritu, eitt nú at møguleiki bleiv fyri at fáa størri bilar til Nólsoyar, til dømis við tilfari og olju. Eisini var eitt sindur røtt um, hvussu tað kundi ávirka bygdina, um persónbilar fóru at koyra í nólsoyar geilum.

Upplýst var annars, at verkætlanin skal verða liðug

Randi Frederiksberg, samskipari:

# Ferðavinnan framtíðin

**Arbeitt hevur verið miðvíst í nakrar mánaðir til tess at gera Nólsoy til eina ferðavinnuoyggj burturav**

BORGARAFUNDUR
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Á fundinum í Nólsoy í gjárkvøldið legði Randi Frederiksberg fyri við at greiða frá arbeiðinum at skapa karmar fyri einari blómandi ferðavinnu í oynni.

Randi metti, at eini 50-60 fólk tilsamans høvdu tikið lut í arbeiðinum so ella so, og at eini seks-átta fólk regluliga høvdu havt fundir aðru hvørja viku til tess at fáa alt klárt til summarið.

Talan er um eina verkætlan, ið umfatar trý hús, faldarar, heimasíðu, føroyakvøld og annað.

Talan verður í fyrsta lagi um eina kunningarstovu, sum verður gjørd í einum gomlum pakkhúsi, sum er umvælt. Har verður dagligur leiðari settur at taka sær av øllum tí vanliga kunningararbeiðinum. Í Kjallaranum verður so innrættað eitt Ovasavn, har báturin Diana Victoria verður at síggja umframt aðrir lutir, sum Ove fekk í sambandi við bragdi at rógva til Danmarkar.

Hartil verður gamli handilin hjá Edvard Hansen, sonevnda Pakkhúsið, nýtt til sølustað fyri føroyska lutir, sum bygdarfólkið hevur tilvirkað.

### Selja upplivingar

Arbeitt hevur eisini verið við at gera serlig pakkatilboð til skúlar og barnagarðar. Í hesum sambandi er eisini ætlanin er inndraga Avhaldashúsið og kanska eisini barnagarðin, so til ber at skifta blæur og tílíkt.

Hetta skulu vera pakkar, ið umfata leikur, matpakkar og annað.

Eisini eru nakrir gongutúrar lagdir til rættis, eitt nú út á Borðuna, suður í Dalar við vitjan Uppi í Skipi á vegnum og túr eystur á Flaggstongina. Framman undan eru drunnhvítatúrarnir hjá Jens Kjeld Jensen bæði kendir og vælumtóktir.

Til tess at kunna um møguleikarnar hevur fyriskipingarbólkurin lagt til rættis faldarar, sum verða at fáa á heilum fimm ymsum málum, umframt at ein heimasíða verður við upplýsandi tilfari. Eisini hava hugskot verið frammi um at skipa fyri føroyakvøldum og »dans på bryggan«.

Roknað verður við, at nýggja kunningarstovan í Nólsoy kann verða klár at taka móti gestum tá hesin mánaðin fer at halla.